## Franskur klovnur vitjar

Ein franskur klovnur kemur á vitjan í Føroyum seinni í mánaðinum. Fríggjakvøldið 20. juni klokkan 19 og leygardagin 21. juni klokkan 16 framførir franski klovnurin O leikin KaO? í Norðurlandahúsinum. Og týsdagin 24. juni klokkan 19 verður hann at hoyra og síggja í Badmintonhøllini í Klaksvík. Harumframt eru skúlasýningar í Norðurlandahúsinum 19. og 20. juni og í Klaksvík 24. Juni. Skúlasýningarnar eru klokkan 10. Pláss er fyri 200 næmingum og lærarum til hvørja sýning. Leiklongdin er 45 minuttir. Skúlasýningarnar eru ókeypis, men til hinar sýningarnar kosta atgongumerkini ávikavist 50 og 80 krónur fyri børn og vaksin.




# Ruth 100 ár



*Høgni Jensen, langabbasonur Peter Jensen, avdúkar modellið av Ruth*




*Sera snotuliga modellið av Ruth*



*Jórun Helmsdal Jensen er einja eftir Peter Jensen, sum var abbasonur Peter Jensen*



*Álvur Danielsen greiðir frá modellinum*

Fríggjadagin á mentunarkvøldinum varð modell av rutubátinum Ruth avdúkað í Smiðjuni í Lítluvík

Tann 11. juni í ár eru júst liðin 100 ár, síðani Ruth kom til landið. Hon var keypt úr Noregi, og var hon 15 bruttotons til støddar. Ruth røkti sambandið úr Havn til Skálafjørðin og Sundalagið millum 1908 og 1926.

Stigtakari til at gera modellið er Álvur Danielsen í Havn. Hann hevur gjørt eitt stórt kanningararbeiði at finna fram til søguna um Ruth og Mjólkaforsýningina. Hann hevur millum annað funnið fram til tekningar av Ruth frá skipasmiðjuni í Noreg.

Hetta tilfar hevur verið prentað í FF-blaðnum, og ein samandráttur var í Miðvikuni 2. apríl, sum var dagin eftir, at Mjólkaforsýningin byrjaði sigling við motorbátinum Dan. Í dag er hundrað ár liðin síðan Ruth legði frá landi í Noregi til Føroyar, og hongur nógv søga í hesum báti.

Við góðum stuðlum hevur eydnast Álvi at fáa gjørt hetta snotiliga modell. Poul Benadikt Petersen, vanliga nevndur Benni, hevur gjørt modellið, sum er 62 cm. langt.

Jóan Petur á Stongunum spældi, og til staðar við opningina av framsýningini var eisini ættin hjá Peter Jensen, sum var stjóri og eldsálin í mjólkaforsýningini frá byrjan av. Tað var langabbasonurin Høgni Jensen, sum avdúkaði modellið, eftir at Álvur hevði greitt eitt sindur frá søguna um Ruth. Aftaná hevði Finnur Johansen hugleiðingar um strandferðslu í Føroyum.

Tey, ið hava fíggjað modellið, eru Postverk Føroya, Postfelagið sum var, Eik Banki, Mentunnargrunnurin, Býráðið og Lions Club Eysturoy. Millum aðrar sponsorar var Bergur í Garði, táverandi stjóri á postverkinum, inni á gólvinum. Ein av gestunum var Edith í Jákupsstovu, ættað úr Lamba. Hon man vera ein av teimum fáu núlivandi føroyingum, sum hevur ferðast við Ruth. Tá var gingið til Søldarfjarðar, har farið varð umborð. Tá hevur tað tikið tímar at koma til Havnar.

Peter Jensen hevur verið ein framúr persónligheit. Umframt at vera eldsálin í mjólkaforsýningini var hann eisini eldsálin í okkara fráhaldsrørslu í mong ár.

Hósdagin í komandi viku, tann 19. juni, fara vit at hava eina lýsing av Peter Jensen í røðini, "Hendur ið Sleptu". Hann og konan Wilhelmine liggja bæði grivin í gamla kirkjugarði. Her verður millum annað greitt frá, tá ið Peter var kærdur til amtmannin, tí hann hevði noktað einum umboðsmanni fyri danska brennivínssølu at ferðast við Ruth!

Álvur greiddi frá, at hann ikki enn visti, hvar modellið skuldi standa, men tað fór so at vera á einum staði, har øll fáa møguleika at síggja tað.

Til ber at síggja framsýningina við modellinum og nógvum forvitnisligum myndum og tekningum til fríggjakvøldið 13. juni, kl. 17-20.



*Nógv fólk við tilknýti til mjólkaforsýningina hava vitjað framsýningina. Uttast t.v. er Eiler Rubeksen. Pápi hansara Christian Martin var ein ímyndin av mjólkaforsýningini sum skipari. Næstur honum er bróðursonurin Rubekk Rubeksen, abbasonur Rubekk, sum eisini var ímynd av mjólkaforsýningini. Her eru teir saman við Álvi, sum hevur gjørt sítt til, at hendan søgan ikki verður gloymd*



*Fleiri fólk vóru til staðar tá framsýningin opnaði*



*Hetta er málningur av Ruth, málaður av Sigmund Petersen. Hann var gáva til Dánjal í Horni á hansara 95 ára føðingardegin í 1965. Hann var maskinmeistari á Ruth alla hennara tíð*